Lesið Sosialin so eru tit við

Vágs Kommuna

# KUNNGERÐ UM RUDDING

Vágs kommuna hevur avgjørt at bilvrak, akfør, bingjur og lutir annars, sum uttan góðkenning frá kommununi rekast á almennum ella privatum økjum, skulu verða beind burtur og latin góðkendum móttakara.

Sambært § 1 í umhvørvislógini og § 1 stk. 4 í náttúrufriðingarlógini er ikki loyvt at lata órudd liggja og rekast á almennum ella privatum uttanduraøki, og í § 10 um burturkast stendur, at ikki er loyvt at lata ónýtilig akfør liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, fram við vegi ella aðrastaðni.

Í § 61 í ferðslulógini stendur, at løgreglan kann burturbeina ella selja skrásetingarskyldug akfør, sum standa á almennum vegi uttan nummarplátu.

Tey, sum eiga/hava frammanfyri nevndu akfør/lutir o.t. á almennum ella privatum øki, skulu beina hetta/hesar burtur skjótast gjørligt.

Verður hetta ikki gjørt innan 1. september 2007, beinir kommunan tað burtur fyri eigarans rokning.

**Vágs kommuna**
**og**
**Sýslumaðurin**

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðlar til borgara á Skálafjørðinum

Stuðulstænastan søkir eftir stuðlum at arbeiða fulla ella niðursetta tíð hjá ungari fjølbrekaðari kvinnu á Skálafjørðinum. Størvini verða sett sum skjótast.

**Arbeiðsuppgávur:**
At stuðla og vera um kvinnuna eftir loknan skúladag. At fara við henni til ymisk tiltøk og soleiðis stuðla henni í at hava ein innihaldsríkan gerandisdag.

**Førleika:**
Umsøkjarar, ið hava eina heilsufrøðiliga útbúgving hava fyrimun til størvini. Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

**Setanartreytir:**
Arbeiðstíðirnar eru skiftandi dag-, kvøld- og náttarvaktir – bæði gerandis- og halgidagar. Talan er um størv innan Nærverkið við fyribils setan í Stuðulstænastuni.

Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá Petru Joensen ella Sofíu Jespersen á tlf: 354020.

**Umsókn:**
Umsókn saman við prógvi, c.v. og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

Stuðulstænastan
Løkjatún 1
FO–160 Argjum Tlf: 354020

**Umsóknarfreist: 3. august 2007.**

## Stuðul til unga kvinnu í Tórshavn

Stuðulstænastan søkir eftir stuðli til unga kvinnu úr Tórshavn at byrja 16. august og hálvt ár fram. Kvinnan er 19 ára gomul, rørslutarnað, men sjálvhjálpin. Henni tørvar ein hjálpara til daglig viðurskifti m.a. tí, at hon skal byrja á Føroya Fólkaháskúla.

Henni tørvar hjálp til smærri ting í dagligdegnum sum t.d. skúlagongd, venjingar, matgerð og annað. Fyrimunur er, um stuðulin hevur koyrikort.

**Setanartreytir:**
Talan er um starv innan Nærverkið, og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá sosialráðgevunum Fía Jespersen og Finnur Joensen á tlf. 354020.

Send eina umsókn til sofiej@naerverk.fo og finnurj@naerverk.fo ella:

Stuðulstænastan
Løkjatún 1,
F0–160 Argjum

**Umsóknarfreist: 3. august 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 30 40 20 · Faks 30 40 10 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# SUMMARFRÍ

Virkið er í summarfrí frá 23. juli til 13. august

**PLÁTUVERKSTAÐIÐ**
**Tel 32 17 78**

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Maskinførari

Søkt verður eftir royndum maskinførara at byrja beinanvegin.

**Ring tel. 210452**

**SP/F K.J.O. ENTREPRENØRAR**
**FO-380 SØRVÁGUR**

**Søkt verður eftir fólki til húsabygging í Havn**

Talan er um fast starv við góðari løn til rætta viðkomandi.

**Ringið á tel. 210800**

**P/f Oyspan**
**á Heygnum Mikla 15**
**100 Tórshavn**